**Semingsuppskot**

Ímillum

**Fíggjarmálaráðið** øðrumegin

og

**Maskinmeistarafelagið** hinumegin,

verður gjørd henda semja:

**Í sáttmálanum fyri maskinmeistarar, motorpassarar og elektrikarar hjá Strandfaraskip Landsins, verða gjørdar hesar broytingar í §6:**

1. Lønin er ásett í lønartalvu, galdandi fyri henda sáttmála. Tann 1. okt. 2017 hækkaðu lønirnar 2,3%.
2. Tann 1. okt. 2018 hækka lønirnar 1,5%. Samstundis verða gjørdar ávísar broytingar í lønarflokkum, sum framganga av hjáløgdu lønartalvu, galdandi frá 1 okt. 2018.

**Í sáttmálanum fyri maskinmeistarar í almennari tænastu á landi, verða gjørdar hesar broytingar í §3:**

1. Lønin er ásett í lønartalvu, galdandi fyri henda sáttmála. Tann 1. okt. 2017 hækkaðu lønirnar 2,3%.
2. Tann 1. okt. 2018 verður nýggj lønartalva sett í gildi – sí skjal.

**Í sáttmálanum fyri maskinmeistara/motorpassara á fiskirannsóknarskipinum Magnus Heinason.**

1. Viðv. løn sambært §3, stk. 3. Tann 1. okt. 2017 hækkar lønin 2,3%.
2. Tann 1. okt. 2018 hækkar lønin 2,5%.

**Alment viðv. øllum sáttmálunum:**
Semjan er galdandi fyri sáttmálaskeiðið frá 1. okt. 2017 fram til 1. okt. 2019.

***Dagførdar ásetingarnar um barsil, har nýggja greinin verður soljóðandi:***

Starvsfólk, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

Stk. 2. Starvsfólk hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.

Stk. 3. Prógvar starvsfólkið við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvsfólkið hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2. Samlaða barsilsfarloyvi við løn er farmvegis 28 vikur.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvsfólk fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

01-06-2018

Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

***Dagføring av grein "Starvssetan og uppsøgn":***

Stk. 1 er óbroytt í øllum sáttmálum.

Stk. 2 verður broytt soleiðis, at starvið skal lýsast leyst alment, á ein slíkan hátt at almenningurin verður kunnugur við lýsingina.

Nýtt stk. 3. Tá ið starvið er sett, skal hann, ið starvið hevur fingið í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fáa setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við,
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. bólking,
6. eftirlønargjald
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og tí setta,
9. arbeiðstíð,
10. frítíð við løn og frítíðarískoyti,
11. setanarøki
12. arbeiðstaður/staðir.

Nýtt stk. 4. Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Maskinmeistarafelagnum.

***Grein um "Skipan fyri skipsmaskinmeistarar uttan gildugt vinnubræv" fyri alla 3 sáttmálar á sjónum***

Sama orðing sum í sáttmálanum fyri SSL kemur inn í hinar sáttmálanar:

§ 12. Skipsmaskinmeistarar uttan gildugt vinnubræv eru sum meginregla fevndir av høvuðs-sáttmálanum, tó við teimum undantøkum/ásetingum, sum her eru tilskilaðar.

Stk. 2. Skipsmaskinmeistarar uttan neyðuga siglingstíð verða løntir til eina og hvørja tíð eftir lønartalvuni millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar hjá Strandferðsluni. Lønin er 75 % av 1. stigi í lønarflokki 3 um mánaðin.

Stk. 3. Setanin og ásetingarnar eru bara galdandi í tíðarskeiðinum til viðkomandi hevur siglt sær til fyrsta vinnubrævið, ið er "Vakthavandi maskinyvirmaður". Um viðkomandi heldur fram í starvi eftir hetta, er tað at meta sum nýggj setan, har sáttmálaviðurskiftini og lønin verða sambært vanligu ásetingunum í høvuðssáttmálanum.

Stk. 4. Skipsmaskinmeistarar hava rætt til at fáa frálæru í øllum viðkomandi skipanum umborð og tað áliggur reiðarínum at bera so í bandi, at hettar kann lata seg gera.

**Broytingar í einstøku sáttmálunum:**

**Viðvíkjandi B: Maskinmeistarum/motorpassarum á Strandferðsluni**

***Protokollat um viðgerð av mynstring:***

Í sáttmálaskeiðinum verður viðgjørt, um til ber at broyta verandi arbeiðsviðurskifti soleiðis, at farið verður yvir til mynstring.

Hetta merkir at verandi arbeiðs- og vaktarætlanir verður strikaðar og skipanin broytt, soleiðis at manning umborð á skipum hjá SSL, fer at mynstra á sama hátt sum t.d. á skipum sum sigla í uttanlanda sigling.

***Broytt orðing av § 14. Stk. 8:***

Fer skip í dokk, verður maskinmeistari, motorpassari og elektrikari umborð, tá ið reiðaríið áleggur honum tað. Verður hetta kravt, skal reiðaríið tryggja manningini góðar umstøður.

Tá Smyril fer í dokk fylgir manningin skipinum, og manningaskift verður ikki framt í dokkingartíðarskeiðinum.

Fyri arbeiði í frívikuni verður veitt 50% afturat vikulønini fyri 91 tímar.

**Viðvíkjandi C: Maskinmeistarar/motorpassarar á fiskirannsóknarskipinum "Magnus Heinason"**

***Nýggj grein:***

Partarnir eru samdir um, at kemur nýtt ella annað skip inn fyri Magnus Heinason í sáttmálaskeiðnum, taka partarnir upp nýggjar samráðingar. Partarnir kunnu tó ikki seta stríðsstig í verk í nevnda sáttmálaskeiðnum.

**Broytt orðing av § 1. Stk 1:**

Hesin sáttmálin er galdandi fyri maskinmeistarar / maskinistar á m/tr. "Magnus Heinasson".

01-06-2018

**Viðvíkjandi D: Maskinmeistarar/motorpassarar á vaktarskipunum,**

***Broytt § 1:***

Henda avtala er galdandi fyri maskinmeistarar / maskinistar á vaktar- og bjargingarskipum landsins.

**§28. Gildi sáttmálans:**

Stk. 1 verður soljóðandi:

Hesin sáttmálin hevur gildi frá 1. okt. 2017. Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við 3 mðr. freist tó í fyrsta lagi til 1. okt. 2019.

Tórshavn, hin 1. juni 2018

Vegna Fíggjarmálaráðið

Kristina Háfoss
*Landsstýriskvinna*

Jan Mortensen
*Lønarstjóri*

Vegna Maskinmeistarafelagið

Ólavur Gunnarsson
*Form.*

Regin Olsen

John Højsted

Jóhan Mørkøre

Hans I. Joensen

01-06-2018

**Maskinmeistarafelagið**

**Lønartalva 1. oktober 2018** **Víst verður til semju millum FMR og MF 1. juni 2018**

*Strandfaraskip Landsins*

Lønarflokkur

| | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **1** | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 1 | 1 | | | | | | | | | | | | | | | 2 |
| 2 | | | | | | | | | | | | | | | | 3 |
| 3 | 2 | | | | | | | | | | | | | | | 4 |
| 4 | | **2** | **2** | | | | | | | | | | | | | 5 |
| 5 | 3 | 1 | 1 | | | | | | | | | | | | | 6 |
| 6 | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 7 |
| 7 | 4 | 3 | 2 | | | | | | | | | | | | | 8 |
| 8 | | 4 | | | | | | | | | | | | | | 9 |
| 9 | 5 | 5 | 3 | | | | | | | | | | | | | 10 |
| | | 6 | | | | | | | | | | | | | | 11 |
| | | 7 | 4 | | | | | | | | | | | | | 12 |
| | | 8 | | **3** | **3** | | | | | | | | | | | 13 |
| | | 9 | 5 | 1 | 1 | | | | | | | | | | | 14 |
| | | | | 2 | | **4** | **4** | | | | | | | | | 15 |
| | | | | 3 | 2 | 1 | 1 | | | | | | | | | 16 |
| | | | | 4 | | 2 | | | | | | | | | | 17 |
| | | | | 5 | 3 | 3 | 2 | | | | | | | | | 18 |
| | | | | 6 | | 4 | | | | | | | | | | 19 |
| | | | | 7 | 4 | 5 | 3 | **5** | **5** | | | | | | | 20 |
| | | | | 8 | | 6 | | 1 | 1 | | | | | | | 21 |
| | | | | 9 | 5 | 7 | 4 | 2 | | | | | | | | 22 |
| | | | | | | 8 | | 3 | 2 | **6** | **6** | | | | | 23 |
| | | | | | | 9 | 5 | 4 | | 1 | 1 | | | | | 24 |
| | | | | | | | | 5 | 3 | 2 | | | | | | 25 |
| | | | | | | | | 6 | | 3 | 2 | | | | | 26 |
| | | | | | | | | 7 | 4 | 4 | | | | | | 27 |
| | | | | | | | | 8 | | 5 | 3 | | | | | 28 |
| | | | | | | | | | 5 | 6 | | | | | | 29 |
| | | | | | | | | | | 7 | 4 | | | | | 30 |
| | | | | | | | | | | | | **7** | **7** | | | 31 |
| | | | | | | | | | | | 5 | 1 | 1 | | | 32 |
| | | | | | | | | | | | | 2 | | | | 33 |
| | | | | | | | | | | | | 3 | 2 | | | 34 |
| | | | | | | | | | | | | 4 | | | | 35 |
| | | | | | | | | | | | | 5 | 3 | | | 36 |
| | | | | | | | | | | | | 6 | | | | 37 |
| | | | | | | | | | | | | 7 | 4 | | | 38 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 39 |
| | | | | | | | | | | | | | 5 | | | 40 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 41 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 42 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 43 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 44 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 45 |
| | | | | | | | | | | | | | | **8** | **8** | 46 |
| | | | | | | | | | | | | | | 1 | 1 | 47 |
| | | | | | | | | | | | | | | 2 | | 48 |
| | | | | | | | | | | | | | | 3 | 2 | 49 |
| | | | | | | | | | | | | | | 4 | | 50 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 3 | 51 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 52 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 4 | 53 |

Maskinmeistarar á landi

## Nýggj lønartalva tann 1. oktober 2018

---

**Lønarflokkar** Stig

---

| | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **-7** | | | | | | | | | | | | | |
| 1 | **-8** | | | | | | | | | | | 16 | 27.458,13 |
| 2 | 1 | **-9** | | | | | | | | | | 17 | 27.938,13 |
| 3 | 2 | 1 | | | | | | | | | | 18 | 28.418,13 |
| 4 | 3 | 2 | **-10** | | | | | | | | | 19 | 28.898,13 |
| 5 | 4 | 3 | 1 | | | | | | | | | 20 | 29.378,13 |
| 6 | 5 | 4 | 2 | **-11** | | | | | | | | 21 | 29.858,13 |
| 7 | 6 | 5 | 3 | 1 | | | | | | | | 22 | 30.338,13 |
| | 7 | 6 | 4 | 2 | | | | | | | | 23 | 30.818,13 |
| | | 7 | 5 | 3 | **-12** | | | | | | | 24 | 31.298,13 |
| | | | 6 | 4 | 1 | **-13** | | | | | | 25 | 31.778,13 |
| | | | 7 | 5 | 2 | 1 | **-14** | | | | | 26 | 32.258,13 |
| | | | | 6 | 3 | 2 | 1 | | | | | 27 | 32.738,13 |
| | | | | 7 | 4 | 3 | 2 | **-15** | | | | 28 | 33.218,13 |
| | | | | | 5 | 4 | 3 | 1 | **-16** | | | 29 | 33.698,13 |
| | | | | | 6 | 5 | 4 | 2 | 1 | **-17** | | 30 | 34.178,13 |
| | | | | | | 6 | 5 | 3 | 2 | 1 | **-18** | 31 | 34.658,13 |
| | | | | | | | 6 | 4 | 3 | 2 | 1 | 32 | 35.138,13 |
| | | | | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 33 | 35.618,13 |
| | | | | | | | | 6 | 5 | 4 | 3 | 34 | 36.098,13 |
| | | | | | | | | | 6 | 5 | 4 | 35 | 36.578,13 |
| | | | | | | | | | | 6 | 5 | 36 | 37.058,13 |
| | | | | | | | | | | | 6 | 37 | 37.538,13 |
| | | | | | | | | | | | | 38 | 38.018,13 |
| | | | | | | | | | | | | 39 | 38.498,13 |
| | | | | | | | | | | | | 40 | 38.978,13 |
| | | | | | | | | | | | | 41 | 39.458,13 |
| | | | | | | | | | | | | 42 | 39.938,13 |
| | | | | | | | | | | | | 43 | 40.418,13 |
| | | | | | | | | | | | | 44 | 40.898,13 |
| | | | | | | | | | | | | 45 | 41.378,13 |
| | | | | | | | | | | | | 46 | 41.858,13 |
| | | | | | | | | | | | | 47 | 42.338,13 |
| | | | | | | | | | | | | 48 | 42.818,13 |
| | | | | | | | | | | | | 49 | 43.298,13 |
| | | | | | | | | | | | | 50 | 43.778,13 |
| | | | | | | | | | | | | 51 | 44.258,13 |
| | | | | | | | | | | | | 52 | 44.738,13 |
| | | | | | | | | | | | | 53 | 45.218,13 |
| | | | | | | | | | | | | 54 | 45.698,13 |
| | | | | | | | | | | | | 55 | 46.178,13 |